


*Teir hava verið ótrúligir í 2010 – skiparar og manning umborð á Hamranesi og Breiðanesi*

# Hvalbiartrolararnir hava verið ótrúligir

**FISKIVINNA Tað má sigast at vera ógvuliga flott av teimum, sum reka og eru við hvalbiartrolarunum, Hamranesi og Breiðanesi, at teir liggja millum allar bestu partrolarapørini í veiðivirði í farna ári. Skipini hava lutfalsliga lítla last og hava ikki loyvi at veiða gulllaks. Haraftrat lá annað skipið í rúma tíð í mai, tá teir høvdu trupulleikar við gearinum**

Vilmund Jacobsen

Partrolararnir í Hvalba, Hamranes og Breiðanes, sum eru gomlu Polarhav og Stjørnan, høvdu eitt óføra gott ár í fjør.

Sosialurin hevur roynt at fingið at vita, hvørjir partrolarar høvdu størsta veiðivirði í farna ári. Bæði teir, sum eiga Vestmenning og Fram og teir, sum eiga Hamranes og Breiðanes, siga, at pørini liggja ógvuliga tøtt – og helst stavn um stavn, soleiðis at blaðið ikki kann taka dagar ímillum.

**» ... vit fara at gera okkara besta, og vit vóna, at hetta fer at røkka – eisini í 2011...**
MIKKJAL HAMMER

Tummas Christophersen, reiðari á Vestmenningi og Fram, hevur áður sagt, at veiðivirðið hjá hansara skipum liggur á umleið 43 miljónum krónum í farna ári, men hann hevur eisini verið vitandi um, at veiðivirðið hjá Hamranesi og Breiðanesi liggur á umleið sama tali.

- Árið í fjør er tað besta í veiðivirði, men úrslitið hevur okkurt árið verið betri, segði Tummas Christophersen.

Um jóltíðir ljóðaði, at Vestmenningur og Fram og Hamranes og Breiðanes lógu so tættir, at parið úr Hvalba loysti 2. Jóladag fyri at vita, um teir kundu hála seg fram um partrolaraparið úr Vestmanna.

Um hetta eydnaðist ella ikki, skal Sosialurin ikki taka dagar ímillum, men í fýra dagar fiskaðu og seldu Hamranes og Breiðanes fyri eina góða miljón krónur.

Skipini vóru úti í fýra dagar og landaðu fiskin í Hvalba. Besti upsaprísurin var 12 krónur fyri kilo, sum má sigast at vera óhoyrt. Umleið helmingurin av veiðini hjá skipunum varð skorið á virkinum í Hvalba og selt sum fesk fløk.

Áðrenn Sosialurin fer at skifta orð við reiðaran á Hamranesi og Breiðanesi, Mikkjal Hammer, kunnu vit leggja aftrat, at trið besta parið í 2010 í veiðivirði helst er leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, sum hava fiskað fyri umleið 41 miljónir krónur.

### Ófør gongd

Mikkjal Hammer í Hvalba er reiðari á trimum skipum, djúpvatnstrolaranum, Steintóri, sum hann eisini plagar at føra av og á – og á Hamranesi og Breiðanesi, sum fyrstu ferð loystu í Hvalba – undir nýggju eigarunum - fyri sløkum tveimum árum síðan.

Og áðrenn vit fara til partrolaraparið, kunnu vit nevnda, at Steintór hevur størsta veiðivirði millum djúpvatnstrolararnar í 2010, nevniliga slakar 23 miljónir krónur.

Mikkjal Hammer er lítillátin, sum rættir menn eiga at vera, og Sosialurin fær hann ikki at siga, at Hamranes og Breiðanes hava størsta veiðivirði av partrolarum í 2010 – og meiri enn tær umleið 43 miljónir krónurnar, sum Vestmenningur og Fram hava fiskað fyri.

### Góðir prísir

Mikkjal Hammer sigur, at